# Ítrótta FAGNAÐUR

## ÍtróttaFELAGSSKAPURIN

***UPPSKOT:***

Ársins ÍtróttaFELAGSSKAPUR er eitt samband ella felag undir ÍSF, sum hevur skarað framúr farna árið.

Hetta er ein vælvirkandi og sunnur felagsskapur, sum tekur ábyrgd og leggur lunnar undir eitt gott og mennandi umhvørvi fyri síni limafeløg ella íðkarar, venjarar, nevndarlimir, sjálvboðin o.o. í ítróttinum. FELAGSSKAPURIN ger eitt sera gott ítróttaligt og samfelagsligt arbeiði.

**Í grundgevingunum kunnu tit greiða frá, hvussu felagsskapurin, sum tit skjóta upp, eitt nú:**

- hevur dirvi at droyma stórt ella øðrvísi
- er sermerktur við síni nýhugsan
- kann vísa á góð úrslit, samstundis sum breiddin verður raðfest
- virðismetir síni sjálvbodnu
- arbeiðir væl skipað
- ger nógv fyri at skapa góðan trivnað

Dentur verður eisini lagdur á, at ársins ÍtróttaFELAGSSKAPUR arbeiðir sambært nýggju strategi'ini hjá ÍSF, sí: https://isf.fo/i-felag-fram-imoti-felags-malum/

***Arbeiðsgongd**:*

- Øll kunnu senda uppskot inn um eitt felag ella eitt samband, sum tey meta, hevur uppiborið heiðurin
- Sambært leiðreglunum velur starvsnevndin Ársins ÍtróttaFELAGSSKAP millum innkomu uppskotini.

**Uppskot verða send inn við eini leinkju, sum verður send út við telduposti ella løgd á heimasíðuna og sosialar miðlar.**